

Føroyska Bíbliufelagið

Kirkjuárið 2016-17

# BÍBLIULESIÆTLANIN

***Soleiðis gert tú:***
*Skriftstað er til hvønn dag í árinum, t.d. Jóh 5,1-18 (Jóhannes-evangeliið 5 kapittul, ørindini 1-18). Tak og les dagsins tekst í Bíbliuni.*
*Aftast í Bíbliulesiætlanini stendur listi við styttingum.*

**Bíbliulesiætlanin**
Kirkjuárið 2016/17
Útgevari: Føroyska Bíbliufelagið

Lars Ole Gjesing hevur valt bíbliutekstirnar
Ritstjórn: Karen Karmark Kristensen
Myndir: Maja Lisa Engelhardt úr Bíbliunnar størstu frásøgnum.
Týtt og rættlisið: Hjørleif Poulsen og Henrietta Arge Jacobsen
Grafikkur: Ann Degen
Uppseting og prent: Føroyaprent
www.biblia.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Tak og les!



Aftur í ár gevur Føroyska Bíbliufelagið út eina bíbliulesiætlan. Hon er ætlað at verða brúkt, annars er íløgan einki verd.

Lesiætlanin hesaferð, er annar partur í røðini, ið førir teg ígjøgnum alla Bíbliuna næstu fýra árini. Tað er týdningarmikið, at vit lesa alla Bíbliuna, at fáa heildina við. Ja, nógv kann vera trupult at skilja, men kanska er tað júst her, tann stóra avbjóðingin og dýrgripurin liggja.

Fara vit at lesa, letur Gud við sínum Heilaga Anda orðið upp fyri okkum og leggur sítt ljós yvir tað, sum annars kann vera trupult at fata. Í Jóh 5,24 stendur: „Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: Tann, sum hoyrir orð mítt og trýr honum, sum sendi meg, hevur ævigt lív og kemur ikki til dóms, men hann hevur stigið yvirum frá deyðanum til lívið."

At lesa í Bíbliuni er ikki bara eitt ítriv ella ein ferð inn í ein spennandi heim av frásøgnum, songum og orðatøkum. Nei, orðini kunna við Guds kraft, føra okkum inn í eitt livandi samfelag við Gud – skapara himins og jarðar. Tá eru vit ikki longur bara lesarar, men fáa lut í teimum lyftum, sum Biblian umtalar.

Lat okkum taka við hesi ríku gávu, at lesa bíbliuna, sum Trúbótin fyri skjótt 500 árum síðan, gjørdi til fólkaogn. Trúbótin var ein stórhending, sum elvdi til andliga, persónliga og kirkjuliga menning í øllum Evropa og um allan heim.

Góðan lesihug!

*Gunnar K. Nattestad*

*Aðalskrivari*

# NOVEMBER-DESEMBER

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 27. | 1.s.í advent • **Matt 21,1-9** |
| Mánadagur 28. | **Matt 1,1-17** • Ættarbók Jesu Krists |
| Týsdagur 29. | **1,18-23** • Sí, moyggin skal verða við barn |
| Mikudagur 30. | **2,1-12** • Hvar er hin nýføddi Jødakongurin? |
| Hósdagur 1. | **Matt 2,13-23** • Rakul tað var, ið um børn síni græt |
| Fríggjadagur 2. | **3,1-17** • Hesin er sonur mín, hin elskaði |
| Leygardagur 3. | **Sl 44,1-9** • Við tíni hjálp vit várar fíggindar fella |
| Sunnudagur 4. | 2.s.í advent • **Luk 21,25-36** |
| Mánadagur 5. | **Matt 4,1-17** • Vendið um, tí at himmiríkið er í nánd! |
| Týsdagur 6. | **4,18-25** • Tíðindi um hann gingu um alt Sýriuland |
| Mikudagur 7. | **5,1-12** • Sæl eru tey í andanum fátæku |
| Hósdagur 8. | **5,13-20** • Eg eri komin at fullføra |
| Fríggjadagur 9. | **5,21-30** • Tit hava hoyrt, at tað hevur verið sagt við teir gomlu |
| Leygardagur 10. | **Sl 44,10-27** • Statt upp og kom okkum til hjálpar |
| Sunnudagur 11. | 3.s.í advent • **Matt 11,2-10** |
| Mánadagur 12. | **Matt 5,31-37** • Men eg sigi tykkum |
| Týsdagur 13. | **5,38-48** • Elskið fíggindar tykkara |
| Mikudagur 14. | **6,1-15** • Tí eiga tit at biðja soleiðis |
| Hósdagur 15. | **6,16-34** • Stúrið ikki fyri lívi tykkara |
| Fríggjadagur 16. | **7,1-14** • Biðið, so skal tykkum verða givið |
| Leygardagur 17. | **Sl 45,1-6** • Fyri konginum eg kvæði mítt flyti fram |
| Sunnudagur 18. | 4.s.í advent • **Jóh 1,19-28** |
| Mánadagur 19. | **Matt 7,15-29** • Hann lærdi tey sum tann, ið eigur mekt og mæti |
| Týsdagur 20. | **8,1-13** • Jesus rætti hondina út |
| Mikudagur 21. | **8,14-22** • Hann tók ilskur várar |
| Hósdagur 22. | **8,23-34** • Hví eru tit ræddir, fátrúnu menn! |
| Fríggjadagur 23. | **9,1-17** • Miskunn mær líkar, og ikki offur |
| Leygardagur 24. | Jólaaftan • **Luk 2,1-14 ella Matt 1,18-25** |
| Sunnudagur 25. | Jóladagur • **Luk 2,1-14** |
| Mánadagur 26. | 2. jóladagur • **Matt 23,34-39** |
| Týsdagur 27. | **Matt 9,18-38** • Miskunna okkum, Dávids sonur |
| Mikudagur 28. | **10,1-20** • Fyri einki hava tit fingið tað, fyri einki skulu tit geva tað |
| Hósdagur 29. | **10,21-11,1** • Á tykkum eru enntá øll hárini á høvdi tykkara tøld |
| Fríggjadagur 30. | **11,2-30** • Alt er fingið mær upp í hendur av faðir mínum |
| Leygardagur 31. | **Orðt 9,1-18** • Ótti fyri Guði er upphav at vísdómi |

# JANUAR

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 1. | Nýggjársdagur • **Luk 2,21** |
| Mánadagur 2. | **1 Tim 1,1-17** • Endamál boðsins er kærleiki |
| Týsdagur 3. | **1,18-3,1** • Tú stríðir hitt góða stríðið |
| Mikudagur 4. | **3,2-13** • Kirkjuliðstænarar eiga at verða siðaðir |
| Hósdagur 5. | **3,14-4,5** • Allur skapningur Guðs er góður |
| Fríggjadagur 6. | Trettandi • **Matt 2,1-12** |
| Leygardagur 7. | **Sl 45,7-18** • Rætt tú elskar, og órætt tú hatar |
| Sunnudagur 8. | 1.s.e. trettanda • **Luk 2,41-52** |
| Mánadagur 9. | **1 Tim 5,1-20** • Teimum, sum synda, skalt tú seta at |
| Týsdagur 10. | **5,21-6,10** • Peningagirndin er rót til alt, som ilt er |
| Mikudagur 11. | **6,11-21** • Stríð trúarinnar góða stríð |
| Hósdagur 12. | **Ez 1,1-21** • Tá kom orð Harrans til prestin Ezekiel |
| Fríggjadagur 13. | **1,22-2,7** • Eg sendi teg til ísraelsmenn |
| Leygardagur 14. | **Sl 46,1-12** • Hann fær kríggið at halda í |
| Sunnudagur 15. | 2.s.e. trettanda • **Jóh 2,1-11** |
| Mánadagur 16. | **Ez 2,8-3,15** • Hann læt meg gloypa bókrulluni |
| Týsdagur 17. | **3,16-27** • Eg seti teg sum varðmann yvir ísraelsmonnum |
| Mikudagur 18. | **4,1-17** • Hetta skal verða ísraelsmonnum tekin |
| Hósdagur 19. | **5,1-17** • Tá skal eg vissuliga eisini beina fyri tær |
| Fríggjadagur 20. | **6,1-14** • Teirra falnu liggja millum skurðgudar |
| Leygardagur 21. | **Sl 47,1-10** • Kongur yvir øllum heimi er Guð |
| Sunnudagur 22. | 3.s.e. trettanda • **Matt 8,1-13** |
| Mánadagur 23. | **Ez 7,1-13** • Nú kemur endin yvir teg |
| Týsdagur 24. | **7,14-27** • Fólkið í landinum stendur við piprandi hondum |
| Mikudagur 25. | **8,1-18** • Eg má rýma langt burtur frá halgidómi mínum |
| Hósdagur 26. | **9,1-11** • Heimsøking borgarinnar nærkast! |
| Fríggjadagur 27. | **10,1-17** • Rødd Guðs hins alvalda, tá ið hann talar |
| Leygardagur 28. | **Orðt 10,1-12** • Kærleiki breiðir yvir øll misbrot |
| Sunnudagur 29. | 4.s.e. trettanda • **Matt 8,23-27** |
| Mánadagur 30. | **Ez 10,18-11,13** • Svørðið skal eg lata koma yvir tykkum |
| Týsdagur 31. | **11,14-25** • Eg skal geva teimum nýtt hjarta |

# Søgubøkurnar í Gamla Testamenti

Tær 39 bøkurnar, sum eru í Gamla Testamenti, kunnu verða býttar sundur í fýra bólkar alt eftir evni og skrivihátti. Tær fyrstu 17 bøkurnar siga frá søguligum hendingum, tær seinastu 16 (uttan Harmljóðini, ið stendur beint eftir bók Jeremiasar profets) eru profetabøkur, sum meira hava boðan heldur enn søguligar frásagnir.

Í miðjuni í innihaldsyvirlitinum í Gamla Testamenti eru tveir teir síðstu bólkarnir: vísdómsbøkurnar (Jobsbók, Orðtøkini og Prædikarin) og tær profetisku skriftirnar, sum allar eru verk, ið eru skrivað í bundnum máli: Sálmarnir, Hásongurin og Harmljóðini.



Fyrsta Mósebók byrjar sum heimssøga við skapanini. Tá ið Guð í frásøgnini um Bábelstornið gevur fólkinum ymisk tungumál og á henda hátt ørkymlar fólkið, verður í 12. kapitli í Fyrstu Mósebók farið at fylgja *einum* fólki, nevniliga ætt Ábrahams. Í endanum á Fyrstu Mósebók verður greitt frá, hvussu eftirkomarar hansara verða savnaðir í Egyptalandi, av tí at hungursneyð er í landinum.

Í Aðru til Fimtu Mósebók verður sagt frá, hvussu Ísraelsfólk, ið líður neyð, verður fríað úr Egyptalandi undir leiðslu Mósesar. Eisini verður sagt frá sáttmálanum, ið varð gjørdur á Sinai fjalli, og ferðini gjøgnum oyðimørkina. Seinast í Fimtu Mósebók stendur Ísraelsfólk við markið til tað lovaða landið, har Móses doyr.

Eftir tað gerst Jósva oddamaður, og bók hansara snýr seg um, at fólkið hertekur og býtir tað lovaða landið sínámillum. Dómarabókin sigur frá um ymsar oddamenn í tíðini, áðrenn ættir Ísraels velja sær ein felags kong.

Síðan koma tær fýra stóru bøkurnar um kongatíðina: Sámuelsbøkurnar og Kongabøkurnar. Tríggir teir fyrstu kongarnir, Saul, Dávid og Sálomon, hava ein stóran leiklut í frásagnunum, og teir ráða yvir øllum Ísraelsfólki.

Eftir hetta fer ríkið í tvíningar og verður býtt sundur í eitt Norðurríki og eitt Suðurríki, har Norðurríkið hvørvur úr bíbilsku frásøgnini, tá ið Assýria hertekur landið í 700-árunum f. Kr.

Suðurríkið, við Jerúsalem sum miðdepli, er sjálvtstøðugt ríki til fyrst í 6. øld f. Kr., tá ið Bábelmenn hertaka tað. Teir leggja templið í oyði og herleiða yvirstættina til Bábylon. Útlegdin stendur við í tvey ættarlið, og síðan kunnu bøkur Ezra og Nehemiassar siga frá, at fólkið verður leysgivið, vendir aftur og endurreisir templið í Jerúsalem.

Tær tvær Krýnikubøkurnar eru styttri frásagnir um hendingarnar alt frá skapanini og til útlegdin í Bábylon endar. Tó leggja tær eisini afturat frásagnunum í øðrum bókum.

Maja Lisa Engelhardt
Úr Bibelens største fortællinger
Bibelselskabets Forlag 2014
síða 86

# FEBRUAR

| | |
|---|---|
| Mikudagur 1. | **Ez 12,1-12** • Herleiddir skulu teir verða og fara í útlegd |
| Hósdagur 2. | **12,13-28** • Et breyð títt í ræðslu |
| Fríggjadagur 3. | **13,1-16** • Sjónir teirra vóru fáfongd |
| Leygardagur 4. | **Sl 48,1-15** • Hans heilaga fjall so yndisliga rísur |
| Sunnudagur 5. | 5.s.e. trettanda • **Matt 13,24-30** |
| Mánadagur 6. | **Ez 13,17-23** • Eg skal bjarga fólki mínum úr bondum tykkara |
| Týsdagur 7. | **14,1-11** • Eg skal taka um hjartað á Ísraelsmonnum |
| Mikudagur 8. | **14,12-15,8** • Svørð, hungur, villdjór og drepsótt |
| Hósdagur 9. | **2 Tim 1,1-18** • Mær leingist eftir at síggja teg |
| Fríggjadagur 10. | **2,1-19** • Guðs orð er ikki bundið |
| Leygardagur 11. | **Sl 49,1-21** • Guð skal loysa mína sál |
| Sunnudagur 12. | Septuagesima • **Matt 20,1-16** |
| Mánadagur 13. | **2 Tim 2,20-3,9** • Á síðstu døgum skulu koma torførar tíðir |
| Týsdagur 14. | **3,10-4,5** • Verð tú verandi í tí, sum tú hevur lært |
| Mikudagur 15. | **4,6-22** • Eg havi strítt hitt góða stríðið |
| Hósdagur 16. | **2 Mós 1,1-22** • Ísraelsmenn aldu børn og nørdust og fjølgaðust |
| Fríggjadagur 17. | **2,1-15** • Hetta man vera eitt av børnum Hebrea |
| Leygardagur 18. | **Sl 50,1-15** • Drottin, Guð Harrin, talað hevur |
| Sunnudagur 19. | Seksagesima • **Luk 8,4-15** |
| Mánadagur 20. | **2 Mós 2,16-3,6** • Tann staður, sum tú stendur á, er heilag jørð! |
| Týsdagur 21. | **3,7-22** • Eg havi sæð eymd fólks míns í Egyptalandi |
| Mikudagur 22. | **4,1-17** • Eg skal vera við munni tínum |
| Hósdagur 23. | **4,18-31** • Ísrael er frumgitni sonur mín |
| Fríggjadagur 24. | **5,1-6,1** • Loyv fólki mínum at fara |
| Leygardagur 25. | **Orðt 10,13-32** • Harrans vegur er hinum sakleysa ein vernd |
| Sunnudagur 26. | Sunnudagur í føstuinngangi • **Matt 3,13-17** |
| Mánadagur 27. | **2 Mós 6,2-25** • Eg skal bjarga tykkum undan trælaoki teirra |
| Týsdagur 28. | **6,26-7,13** • Eg skal herða hjarta Fáraos |

# MARS

| | |
|---|---|
| Mikudagur 1. | **2 Mós 7,14-25** • Blóð var um alt Egyptaland |
| Hósdagur 2. | **8,1-11** • Tá skriðu froskarnir upp og huldu Egyptaland |
| Fríggjadagur 3. | **8,12-28** • Tó herdi Fárao hjarta sítt |
| Leygardagur 4. | **Sl 50,16-23** • So tú heldur, at eg eri sum tú! |
| Sunnudagur 5. | 1.s. í føstu • **Matt 4,1-11** |
| Mánadagur 6. | **2 Mós 9,1-12** • Tá skal hond Harrans koma yvir fenað tín |
| Týsdagur 7. | **9,13-35** • Harrin læt hegling ymja yvir Egyptaland |
| Mikudagur 8. | **10,1-20** • Ongsprettur koma yvir Egyptaland |
| Hósdagur 9. | **10,21-29** • Tílíkt myrkur, at takandi er í tað! |
| Fríggjadagur 10. | **11,1-10** • Um miðju nátt vil eg ganga mitt ígjøgnum Egyptaland |
| Leygardagur 11. | **Sl 51,1-8** • Náða meg, Guð, fyri miskunn tína |
| Sunnudagur 12. | 2.s í føstu • **Matt 15,21-28** |
| Mánadagur 13. | **Matt 12,1-21** • Sí, tænari mín, sum eg kjósaði mær |
| Týsdagur 14. | **12,22-32** • Tá er Guðs ríki komið á tykkum |
| Mikudagur 15. | **12,33-50** • Av fruktini man træið kennast |
| Hósdagur 16. | **13,1-23** • Ein sáðmaður fór út at sáa |
| Fríggjadagur 17. | **13,24-35** • Eg vil lata munn mín upp í líknilsum |
| Leygardagur 18. | **Sl 51,9-21** • Skapa, Guð, mær hjarta reint |
| Sunnudagur 19. | 3.s. í føstu • **Luk 11,14-28** |
| Mánadagur 20. | **Matt 13,36-52** • Himmiríkið er líkt einum dýrgripi |
| Týsdagur 21. | **13,53-14,12** • Gev mær higar høvd Jóhannesar doyparans á einum fati |
| Mikudagur 22. | **14,13-36** • Havið gott treyst! Tað eri eg! |
| Hósdagur 23. | **15,1-20** • Tað, ið fer út úr munninum, kemur frá hjartanum |
| Fríggjadagur 24. | **15,21-39** • Kona, stór er trúgv tín! |
| Leygardagur 25. | **Orðt 11,1-11** • Kemur hugmóð, kemur skomm |
| Sunnudagur 26. | Miðføstu Sunnudagur • **Jóh 6,1-15** |
| Mánadagur 27. | **Matt 16,1-12** • Ein ónd og ótrúgv slekt biður um tekin |
| Týsdagur 28. | **16,13-28** • Tú ert Kristus, sonur hins livandi Guðs |
| Mikudagur 29. | **17,1-13** • Hesin er sonur mín, hin elskaði |
| Hósdagur 30. | **17,14-27** • Menniskjusonurin fer at verða givin upp í mannahendur |
| Fríggjadagur 31. | **18,1-20** • Menniskjusonurin er komin at bjarga tí, ið er burtur farið |



Maja Lisa Engelhardt
Úr Bibelens største fortællinger
Bibelselskabets Forlag 2014
síða 60

# Egyptaland

Flestu søguligu hendingarnar í Bíbliuni fara fram í tí lítla landøkinum millum Jordan ánna og Miðjarðarhavið, ið eitur Kánaansland, Ísrael ella Palestina. Hetta landøkið liggur ímillum tær tvær stóru mentanirnar í Miðeystri, ið liggja tætt við stórar áir: Tann egyptiska við Nilánna og tann mesopotamiska við áirnar Evfrat og Tigris, sum nú er Irak. Hesi viðurskifti hava sett dám á søguna hjá hesum landøki og koma til sjóndar í fleiri bíbilskum frásøgnum.

Í frásøgnunum um Ábraham, Ísak og Jákup í Fyrstu Mósebók verður Egyptaland mett sum eitt friðskjól. Ábraham fer hagar við Sáru, tá ið hungursneyð er (Fyrsta Mósebók 12. kapittul ), og síðan ger ætt Jákups tað sama (Fyrsta Mósebók 46.kapittul).

Týdningarmiklir karavanvegir gingu millum londini ígjøgnum Palestina. Hetta sæst aftur í frásøgnini um Jósef, sum brøður hansara seldu keypmonnum, ið fóru framvið á veg til Egyptalands (Fyrsta Mósebók 37. kapittul). Í Frásøgnini um Jósef í Egyptalandi fær ein ta fatan, at egyptiska kongsdømið hevur ógvuliga stórt vald, og at Fárao er hægsti myndugleiki.

Í Aðru Mósebók verður Egyptaland ógvuliga nógv umtalað. Tað er júst har, ið ætt Jákups verður til Ísraelsfólk, ið má trælka í Egyptalandi, til teirra fedranna Guð sær í náði til teirra. Hóast Egyptar gera stóra mótstøðu, leiðir hann tey út í oyðimørkina og ger sáttmála við tey á Sinai fjalli. Ein av týdningarmestu lýsingunum av Guði í Gamla Testamenti er „Eg eri hann, ið leiddi tykkum út úr Egyptalandi“ – sum ofta stendur sum mótsetningur til teir kánaneisku gudarnar, sum fólkið fall til at dyrka.

Í kongatíðini eru fleiri dømi um, hvussu Kánansland liggur ímillum tvær tjóðir, ið stríðast hvør móti aðrari við nógvum valdi, Egyptaland og Mesopotamia.
Í Nýggja Testamenti fær Egyptaland aftur sín gamla leiklut sum friðskjól. Tá ið Jósef við Mariu og nýfødda soni hennara flýggjar hagar undan Heródesi kongi (Matteusar evangeliið 2. kapittul). Umframt hetta verður Egyptaland í Nýggja Testamenti fyri tað mesta nevnt í tilvísingum til frásøgnina um ferðina úr Egyptalandi í Aðru Mósebók (Ápostlasøgan 7. kapittul).

# APRÍL

| | |
|---|---|
| Leygardagur 1. | **Sl 52,1-11** • Guðs miskunn eg líti á |
| Sunnudagur 2. | Boðanardagur Mariu • **Luk 1,26-38** |
| Mánadagur 3. | **Matt 18,21-35** • Og harranum at hesum tókti hjartaliga synd í honum |
| Týsdagur 4. | **19,1-15** • Latið smábørnini koma og forðið teimum ikki at koma til mín |
| Mikudagur 5. | **19,16-30** • Hjá Guði er alt gjørligt |
| Hósdagur 6. | **20,1-19** • Soleiðis skulu teir seinastu verða fyrstir og teir fyrstu seinastir |
| Fríggjadagur 7. | **20,20-34** • Menniskjusonurin er komin at tæna |
| Leygardagur 8. | **Sl 53,1-7** • Er nakar vitur, nakar, ið søkir Guð |
| Sunnudagur 9. | Pálmasunnudagur • **Matt 21,1-9** |
| Mánadagur 10. | **Ez 16,1-20** • Tú helti út hordóm tín yvir hvønn vallara |
| Týsdagur 11. | **16,22-43** • Tú ósømdi fagurleika tín |
| Mikudagur 12. | **16,44-63** • Eg skal binda ævigan sáttmála við teg |
| Hósdagur 13. | Skírhósdagur • **Matt 26,17-30 ella Luk 22,14-20** |
| Fríggjadagur 14. | Langi fríggjadagur • **Matt 27,31-50 ella Mark 15,20-37** |
| Leygardagur 15. | **Sl 54,1-9** • Sí, Guð er hjálpari mín |
| Sunnudagur 16. | Páskadagur • **Mark 16,1-8** |
| Mánadagur 17. | 2. páskadagur • **Luk 24,13-35** |
| Týsdagur 18. | **Ez 17,1-10** • Man tað fara at eydnast? |
| Mikudagur 19. | **17,12-18,4** • Eg flyti hann til Bábelborgar |
| Hósdagur 20. | **18,5-20** • Hann skal ikki doyggja fyri misgerðir faðirs síns |
| Fríggjadagur 21. | **18,21-19,9** • So at tit fáa tykkum nýtt hjarta og nýggjan anda |
| Leygardagur 22. | **Sl 55,1-16** • Hjarta mítt gevur seg í mínum brósti |
| Sunnudagur 23. | 1.s.e. páskir • **Jóh 20,19-31** |
| Mánadagur 24. | **Ez 19,10-20,10** • Hjágudar Egyptalands vildu teir ikki geva yvir |
| Týsdagur 25. | **20,11-32** • Tit hava gjørt tykkum óreinar til heiðurs fyri hjágudar tykkara |
| Mikudagur 26. | **20,33-44** • Eg leiði tykkum inn í Ísraels land |
| Hósdagur 27. | **21,1-22** • Svørð, hvast svørð |
| Fríggjadagur 28. | **21,23-32** • Hann hevjar glymjandi herróp til tess at reisa múrbrótara |
| Leygardagur 29. | **Orðt 11,12-21** • Rangsinnaðir eru Harranum ein andstygd |
| Sunnudagur 30. | 2.s.e. páskir • **Jóh 10,11-16** |

# MAI

| | |
|---|---|
| Mánadagur 1. | **Ez 22,1-16** • Eg man spjaða teg út ímillum tjóðanna |
| Týsdagur 2. | **22,17-31** • Høvdingar tínir eru eins og ýlandi ljón |
| Mikudagur 3. | **23,1-10** • Hon brann í girnd eftir ástarmonnum sínum |
| Hósdagur 4. | **23,11-31** • Eg vil eggja móti tær ástmenn tínar |
| Fríggjadagur 5. | **23,32-49** • Soleiðis skal skemdin verða oydd úr landinum |
| Leygardagur 6. | **Sl 55,17-24** • Harrin loysir út sál mína |
| Sunnudagur 7. | 3.s.e. páskir • **Jóh 16,16-22** |
| Mánadagur 8. | **Ez 24,1-14** • Tala í líkingarmáli við hitt tvørlynda ættarkynið |
| Týsdagur 9. | **24,15-27** • Ezekiel skal verða tykkum tekin |
| Mikudagur 10. | **Matt 21,1-17** • Sí, kongur tín til tín kemur |
| Hósdagur 11. | **21,18-32** • Hvør hevur givið tær hetta valdið |
| Fríggjadagur 12. | Dýri biðidagur • **Matt 3,1-10** |
| Leygardagur 13. | **Sl 56,1-14** • Øll teirra hugsan er móti mær til tað illa |
| Sunnudagur 14. | 4.s.e páskir • **Jóh 16,5-15** |
| Mánadagur 15. | **Matt 21,33-46** • Teir ætlaðu at taka hann á hondum |
| Týsdagur 16. | **22,1-22** • Gevið Guði tað, ið Guðs er! |
| Mikudagur 17. | **22,23-46** • Tey vórðu bilsin av læru hansara |
| Hósdagur 18. | **23,1-22** • Tann, ið er størstur av tykkum, skal vera tænari tykkara |
| Fríggjadagur 19. | **23,23-39** • Tykkara blindu vegleiðarar! |
| Leygardagur 20. | **Sl 57,1-12** • Eg søki skjól undir skugga veingja tína |
| Sunnudagur 21. | 5.s.e. páskir • **Jóh 16,23b-28** |
| Mánadagur 22. | **Matt 24,1-22** • Varið tykkum, at eingin villleiðir tykkum |
| Týsdagur 23. | **24,23-41** • Orð míni skulu als ikki ganga undir |
| Mikudagur 24. | **24,42-25,13** • Tit vita hvørki dagin ella tíman! |
| Hósdagur 25. | Kristi himmalsferðardagur • **Mark 16,14-20** |
| Fríggjadagur 26. | **Matt 25,14-30** • Tað var væl gjørt, tú góði og trúgvi húskallur! |
| Leygardagur 27. | **Orðt 11,22-31** • Fruktin hjá rættvísum er eitt lívstræ |
| Sunnudagur 28. | 6.s.e. páskir • **Jóh 15,26-16,1-4** |
| Mánadagur 29. | **Matt 25,31-46** • Komið higar, tit hini vælsignaðu hjá faðir mínum |
| Týsdagur 30. | **26,1-16** • Meg hava tit ikki altíð |
| Mikudagur 31. | **26,17-29** • Hetta er blóð mítt, blóð sáttmálans |

# Ezekiel

Ezekiels bók er tann triðja av teimum fýra stóru profetabókunum í Gamla Testamenti. Í bókini verður í 1. persóni greitt frá stóru sjónunum, ið profeturin fær, og øllum hansara virki, ið fer fram fyrst í útlegdini í Bábylon. Bókin byrjar við, at Jerúsalem fellur, og tey fyrstu av Júdaætt verða herleidd. Jójakin kongur og Ezekiel sjálvur verða herleiddir í árinum 597 f. Kr. Við støði í hesari byrjan verða sjónir Ezekiels og ávísar stórar hendingar í bókini tíðarfestar.

Sjónir Ezekiels eru ofta ógvusligar. Tær fara fram í Babylon, men tað forðar ikki fyri, at Ezekiel sær, hvat hendir í Jerúsalem. Kall hansara fara fram í einari sjón, har hann sær Guðs trónuhimmal. Har er stormur, glitrandi hvítagull, veldig vøtn buldra, og har eru himmalskar verur, sum bera trónuna (Ezekielsbók 1.- 3. kapittul). Henda sjón er tíðarfest til fimta árið í útlegd, t.e. 594 f.Kr., og síðan fylgja sjónir, ið vera tíðarfestar fram til 27. árið í útlegd.

Ezekiel fær álagt at boða fólki sínum frá, at útlegdin, hertøka Jerúsalems, og at templið er lagt í oyði er tann rættvísa revsingin fyri, at fólkið hevur dyrkað fremmandar gudar. Í einari sjón í 10. og 11. kapitli verður livandi greitt frá, hvussu Guð fer úr templi sínum og fer úr Jerúsalem, av tí at fólkið í staðnum er ólýðið. Hetta verður í 16. kapitli enntá lýst sum hor.

Í fleiri myndligum dømum vísir Ezekiel fólki sínum, at tey verða kringsett og send í útlegd, og at tað er fólksins egna skyld. Ezekiel leggur dent á, at hvør einstakur má bera revsingina fyri síni egnu misbrot og ikki fyri tey, ið forfedarnir hava gjørt.

Í gjøgnum bókina broytist tónin og innihaldið. Í fleiri kapitlum frá 25. vendir profeturin vreiði sína ímóti teimum fólkasløgum, ið hava notið gott av og hava erpað sær av falli Jerúsalems, og frá 34. kapitli fer Ezekiel frá at boða Guðs revsing til at boða lyfti um endurreisn, um uppreisn fólksins, og at Jerúsalem og templið verða endurreist. Í 43. kapitli sær Ezekiel Guð venda aftur til tempul sítt, og at tempultænastan verður endunýggjað.

Eftir Ezekiels sjónarmiðjum tey fyrstu árini í útlegd er alt hetta framvegis ein framtíðarvón. Og vónin er ikki grundað á væntanir um, at fólkið fer at batna, men at Guð fer at taka steinhjartað úr teimum og geva teimum eitt nýtt hjarta og ein nýggjan anda, soleiðis at tey aftur kunnu vera fólk hansara (Ezekiels bók 11. kapittul ørindini 17- 20).



Maja Lisa Engelhardt
Fra Bibelens største fortællinger
Bibelselskabets Forlag 2014
side 106

# JUNI

| | |
|---|---|
| Hósdagur 1. | **Matt 26,30-46** • Sál mín er sorgarbundin heilt til deyða |
| Fríggjadagur 2. | **26,47-56** • Tá fóru allir lærusveinarnir frá honum og rýmdu. |
| Leygardagur 3. | **Sl 58,1-12** • Nei, allir gera tit svik á jørðini |
| | |
| Sunnudagur 4. | Hvítusunnudagur • **Jóh 14,22-41** |
| Mánadagur 5. | 2. hvítusunnudagur • **Jóh 3,16-21** |
| Týsdagur 6. | **Matt 26,57-68** • Ert tú Kristus, sonur Guðs? |
| Mikudagur 7. | **26,69-27,10** • Eg kenni ikki tann mannin |
| Hósdagur 8. | **27,11-31** • Heilur og sælur, tú, Jøda kongur |
| Fríggjadagur 9. | **27,32-44** • Teir býttu klæði hansara sundur ímillum sín |
| Leygardagur 10. | **Sl 59,1-8** • Bjarga mær, Guð mín, frá fíggindum mínum |
| | |
| Sunnudagur 11. | Trinitatis sunnudagur • **Jóh 3,1-15** |
| Mánadagur 12. | **Matt 27,45-66** • Guð mín, Guð mín, hví fórt tú frá mær? |
| Týsdagur 13. | **28,1-20** • Hann er risin upp, sum hann hevur sagt |
| Mikudagur 14. | **Dóm 1,1-21** • Júdamenn herjaðu á Jerúsalem og tóku hana |
| Hósdagur 15. | **1,22-36** • Kánáanitar hildu áfram at búgva millum teirra |
| Fríggjadagur 16. | **2,1-15** • Teir sviku Harran og dýrkaðu Báal |
| Leygardagur 17. | **Sl 59,9-18** • Guð mín við náði síni mær kemur ímóti |
| | |
| Sunnudagur 18. | 1.s.e. trinitatis • **Luk 16,19-31** |
| Mánadagur 19. | **Dóm 2,16-3,6** • Teir dýrkaðu gudar teirra |
| Týsdagur 20. | **3,7-25** • Ehud gjørdi sær tvíeggjað svørð |
| Mikudagur 21. | **3,26-4,10** • Um tað mundið var profetkona dómari í Ísrael, Debora nevnd at navni |
| Hósdagur 22. | **4,11-24** • Vissuliga gongur Harrin undan tær |
| Fríggjadagur 23. | **5,1-15a** • Hjarta mítt titrar vegna høvdinga Ísraels |
| Leygardagur 24. | **Orðt 12,1-14** • Tann, ið hatar revsing, er fákunnur |
| | |
| Sunnudagur 25. | 2.s.e. trinitatis • **Luk 14,16-24** |
| Mánadagur 26. | **Dóm 5,15b-31** • Hógvar hestanna dundu |
| Týsdagur 27. | **6,1-10** • Tá var Ísrael illa farin |
| Mikudagur 28. | **6,11-24** • Eg skal koma við tær |
| Hósdagur 29. | **6,25-40** • Ætla tit at flyta mál Báals ella at hjálpa honum? |
| Fríggjadagur 30. | **7,1-15** • Tú hevur ovmikið herlið við tær |

# JULI

| | |
|---|---|
| Leygardagur 1. | **Sl 60,1-14** • Bert eitt eiti er mannahjálp |
| Sunnudagur 2. | 3.s.e. trinitatis • **Luk 15,1-10** |
| Mánadagur 3. | **Dóm 7,16-25** • Fyri Harran og fyri Gideon |
| Týsdagur 4. | **8,1-21** • Loypti ekka á allan herin. |
| Mikudagur 5. | **8,22-9,5** • Harrin skal valda tykkum |
| Hósdagur 6. | **9,6-9,21** • Ver tú nú kongur yvir okkum! |
| Fríggjadagur 7. | **9,22-41** • Nør bert um her tín og kom út |
| Leygardagur 8. | **Sl 61,1-9** • Frá landsins ytsta enda eg á teg kalli |
| Sunnudagur 9. | 4.s.e. trinitatis • **Luk 6,36-42** |
| Mánadagur 10. | **Dóm 9,42-57** • Hann breyt borgina niður og stroyddi hana við salti |
| Týsdagur 11. | **10,1-18** • Farið nú og rópið teir gudar, sum tit hava kosið tykkum |
| Mikudagur 12. | **Ez 25,1-17** • Herjaðu við miklum hevndarhugi og vanmetan |
| Hósdagur 13. | **26,1-14** • Týrus háðandi sigur um Jerúsalem |
| Fríggjadagur 14. | **26,15-21** • Teir hevja harmljóð um teg |
| Leygardagur 15. | **Sl 62,1-13** • Mín vernd er Guð |
| Sunnudagur 16. | 5.s.e. trinitatis • **Luk 5,1-11** |
| Mánadagur 17. | **Ez 27,1-11** • Fagurleiki mín er fullkomin |
| Týsdagur 18. | **27,12-36** • Hevja rødd sína yvir teg og kvarta sáran |
| Mikudagur 19. | **28,1-19** • Tú ert maður og eingin gudur |
| Hósdagur 20. | **28,21-29,9** • Eg savni Ísraels hús saman úr tjóðunum, har ið teir vóru spjaddir um |
| Fríggjadagur 21. | **29,10-30,5** • Sí, eg gevi Nebukadnezari, Bábelkongi, Egyptaland |
| Leygardagur 22. | **Sl 63,1-12** • Tí at betri enn lív er náði tín |
| Sunnudagur 23. | 6.s.e. trinitatis • **Matt 5,20-26** |
| Mánadagur 24. | **Ez 30,6-19** • Lúta skal tess hástóra vald |
| Týsdagur 25. | **30,20-31,9** • Armar Fáraos skulu niður signa |
| Mikudagur 26. | **31,10-18** • Eg lati hann søkka niður í helheimin |
| Hósdagur 27. | **32,1-16** • Svørð Bábelkongs skal koma yvir teg |
| Fríggjadagur 28. | **32,17-32** • Saman við óumskornum liggja teir |
| Leygardagur 29. | **Orðt 15,12-28** • Muðurin á gudleysum goysir út illskap |
| Sunnudagur 30. | 7.s.e. trinitatis • **Mark 8,1-9** |
| Mánadagur 31. | **Ez 33,1-20** • Eg skal døma hvønn tykkara eftir vegi hans |

# Frá Bíbliufelagnum:
# Bíbliuútgávur í bókabúðunum

## Myndasøgan um Menniskjusonin




120,-

er grundað á tey fýra evangeliini í Nýggja Testamenti. Pætur apostul lænir okkum eygu at síggja tær hjartanemandi og skakandi hendingarnar kring um Jesu lív.
136 síður

## Bíblia – Ættarbíblia
við stórari skrift

Stødd 21,5 x 30,4 cm.
Við gullskurði.
1211 síður
Myndprýtt hevur hennara hátign Margreta drotning II.



600,-

245,-




## Bíblia

Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður
Kápa: Edward Fuglø

## Gamla testamenti sum ljóðbók

Gamla og Nýggja testamenti fáast sum ljóðbøkur bæði á fløgu og á bandi fyri sama prís.




900,-

## Nýggja testamenti sum ljóðbók

300,-

Sí annars á www.biblia.fo



120,-

## Bíblian – Úrvalssøgur

Úrvaldir bíbliutekstir til børn og vaksin við 50 hugvekjandi heilsíðumyndum hjá Esben Hanefelt Kristensen.

## Bíblia Í lummastødd

Stødd 10,5 x 16,4 cm.
1211 síður

Í svørtum leðurlíki
við dragulási



249,-



345,-

## Bíblia í svørtum

leðurlíki við gullskurði
Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður

# Fyrstu ferð í hálva øld!

Í 2017 er ætlanin, at útgeva Nýggja testamenti á gerandismáli, serliga ætlað ungum og bíbliu fremmandum.

Tú kanst longu nú vera við at stuðla hesi verkætlan við at flyta gávu á hesar kontur:

- BankNordik konta nr. 6460 3828737
- Eik Banki konta nr. 9181 3807772
- Norðoya Sparikassi konta nr. 9865 9926466
- Suðuroyar Sparikassi konta nr. 9870 9929920618

# Bábylon

Tað bábyloniska ríkið er bert eitt av teimum ríkjum, sum í fornøldini komu eftir hvørt annað í Mesopotamiu, t.e. økið við Evfrat og Tigris. Tey mesopotamisku ríkini hava havt týdningarmikla ávirkan í Ísrael og hava stóran leiklut í bíbliusøguni.

Bábylon er upprunaliga navnið á einum býi við Evfrat í ein útsynning úr núverandi Bagdad. Býarnavnið Bábel í frásøgnini um Bábelstornið (Fyrsta Mósebók 11. kapittul) er tað sama sum Bábylon.

Í frásøgnini um Ábraham, Ísak og Jákup er lívligt samband millum Kánáans land og áarlandið. Sagt verður, at ætt Ábrahams kom úr Ur, sum er ein býur í sunnasta parti í Mesopotamiu, og at longu faðir Ábrahams, Tera, flutti haðan við ætt síni til Káran, sum er í norðasta parti í Mesopotamiu.



Tað er hiðan, Ábraham verður kallaður at fara til Kánáan ( Mósebók 11. og 12. kapittul). Og sambandið millum tey bæði økini verður varðveitt, við tað at kona Ísak, Rebekka, er úr ættini í Káran, og Jákup eftirsíðan flýggjar hagar. Eisini kona hansara er úr ættini í Káran. Harvið vísir søgan um patriarkarnar greitt, at Ísraels fólk hevur sínar røtur í landinum millum áirnar.

Meginpartin av Ísraels kongatíð eru tað assýrar, sum við Ninive sum høvuðsstaði hava valdið í tí messopotamiska økinum, og teir kroysta ísraelsmenn illa, so Norðurríkið fer til grundar, og Jerúsalem verður kringsettur – men verður tó ikki hertikin ( Seinna Kongabók 17. og 19. kapittul).

Eftir Assýrararnar eru tað Bábylonararnir, sum taka valdið í Mesopotamiu, og tað fær hættisligan avleiðingar fyri Júdaríkið kring Jerúsalem.

Fyrst í 6. øld f. Kr. hertekur Nebukadnesar, Bábel kongur, á fleiri herferðum Jerúsalem, oyðir býin og templið og førir oddamenn fólksins í útlegd í Bábel (Seinna Kongabók 24. og 25. kapittul og Jeremia 38. kapittul og fylgjandi kapitlar). Henda útlegdin varir til persarakongurin Kýros vinnur á Bábylonarunum og leysgevur tey útlagnu, so tey kunnu fara heimaftur í árinum 538 f. Kr. Og fara at byggja býin og templið uppaftur (Seinna Krýnikubók 36. kapittul og eisini Ezra og Nehemia).

Mong vórðu verandi í Bábel og skaptu eitt sterkt jødiskt samfelag har. 137. sálmur er ein sterkur vitnisburður um sorg um útlegdina og longsulin eftir Jerúsalem. Men nógv bendir á, at útlegdin gjørdist ein tíð, har fólkið savnaði seg um eina røð av teimum eginleikum, sum skuldu gerast avgerandi í jødadóminum: sabbat, reinleika, umskering og helst eisini í sýnagoguskipanini.

Maja Lisa Engelhardt
Úr Bibelens største fortællinger
Bibelselskabets Forlag 2014
síða 150

# AUGUST

Týsdagur 1. **Ez 33,21-33** • Profetur hevur verið teirra millum
Mikudagur 2. **34,1-16** • Mansbarn, profetera móti hirðum Ísraels
Hósdagur 3. **34,17-31** • Eg skal skipa einans hirða yvir teir
Fríggjadagur 4. **35,1-15** • Se›irs fjallaland, eg geri teg til oyðimørk og reyn
Leygardagur 5. **Sl 64,1-11** • Mær bjarga frá níðinga felagi

Sunnudagur 6. 8.s.e. trinitatis • **Matt 7,15-21**

Mánadagur 7. **Ez 36,1-15** • Borgirnar skulu verða bygdar
Týdagur 8. **36,16-38** • Anda mín leggi eg tykkum í bróst
Mikudagur 9. **37,1-14** • Sí, eg lati anda koma í tykkum, so at tit verða livandi
Hósdagur 10. **37,15-38,7** • Og eg geri teir til eina tjóð í landinum
Fríggjadagur 11. **38,8-23** • Kemur tú til tess at ræna og rupla
Leygardagur 12. **Sl 65,1-14** • Guðs løkur er fullur av vatni

Sunnudagur 13. 9.s.e. trinitatis • **Luk 16,1-9**

Mánadagur 14. **Ez 39,1-20** • Soleiðis skal landið verða reinsað
Týsdagur 15. **39,21-29** • Og ikki meira fjali andlit mítt fyri teimum
Mikudagur 16. **Dóm 11,1-28** • Hava tit ikki lagt hatur á meg
Hósdagur 17. **11,29-40** • Eg havi latið upp munn mín fyri Harranum
Fríggjadagur 18. **12,1-15** • Sig Sjibbolet!
Leygardagur 19. **Sl 66,1-20** • Vit fóru gjøgnum eld og vatn

Sunnudagur 20. 10.s.e. trinitatis • **Luk 19,41-48**

Mánadagur 21. **Dóm 13,1-25** • Harrin sum virkar undursamt
Týsdagur 22. **14,1-20** • Hann skræddi tað sundur við báðum hondum
Mikudagur 23. **15,1-16,3** • Vit eru komnir higar oman til tess at binda teg
Hósdagur 24. **16,4-22** • Samson, Filistar koma eftir tær!
Fríggjadagur 25. **16,23-31** • Lat meg so doyggja saman við Filistum!
Leygardagur 26. **Orðt 13,1-12** • Maður nýtur gott av fruktum munsins

Sunnudagur 27. 11.s.e. trinitatis • **Luk 18,9-14**

Mánadagur 28. **Dóm 17,1-13** • Leviti er vorðin prestur hjá mær
Týsdagur 29. **18,1-20** • Verð faðir og prestur hjá okkum
Mikudagur 30. **18,21-31** • Tit hava tikið gudar mínar, sum eg gjørdi mær
Hósdagur 31. **19,1-21** • Eingin kom at bjóða teimum heim til sín at gista

# SEPTEMBER

| | |
|---|---|
| Fríggjadagur 1. | **Dóm 19,22-30** • Kom út higar við manninum |
| Leygardagur 2. | **Sl 67,1-8** • Hann lati andlit sítt yvir okkum lýsa |
| Sunnudagur 3. | 12.s.e. trinitatis • **Mark 7,31-37** |
| Mánadagur 4. | **Dóm 20,1-17** • Flýggið nú út menninar, hasi vittuggini í Gibeu |
| Týsdagur 5. | **20,18-29** • Herja á hann |
| Mikudagur 6. | **20,30-48** • Teir sóu, at ógævan nú var komin yvir teir |
| Hósdagur 7. | **21,1-25** • Á teimum døgum var eingin kongur í Ísrael |
| Fríggjadagur 8. | **Ez 40,1-16** • Kunnger tú Ísraels húsi alt, sum tú sært |
| Leygardagur 9. | **Sl 68,1-15** • Tað land tú armingum reiðir til |
| Sunnudagin 10. | 13.s.e. trinitatis • **Luk 10,23-37** |
| Mánadagur 11. | **Ez 40,17-34** • Hann máldi longdina og breiddina |
| Týsdagur 12. | **40,35-41,2** • Síðan máldi hann forgarðin |
| Mikudagur 13. | **41,3-26** • Hetta er hitt alra heilagasta |
| Hósdagur 14. | **42,1-20** • Múrur gjørdi skilnað millum hitt heilaga og hitt óheilaga |
| Fríggjadagur 15. | **43,1-12** • Tá kom dýrd Ísraels Guðs úr eystri |
| Leygardagur 16. | **Sl 68,16-26** • Skoðið skrúðgongu Guðs |
| Sunnudagur 17. | 14.s.e. trinitatis • **Luk 17,11-19** |
| Mánadagur 18. | **Ez 43,13-27** • Hetta er mát altarsins í alnatali |
| Týsdagur 19. | **44,1-9** • Hetta liðið skal vera lokað |
| Mikudagur 20. | **44,10-31** • Teir mega nærkast mær |
| Hósdagur 21. | **45,1-12** • Veita Harranum heilagan lut av landinum |
| Fríggjadagur 22. | **45,13-46,3** • Hetta er tann offuravskurður, ið tit skulu geva |
| Leygardagur 23. | **Sl 68,27-36** • Tit ríki á jørð! Syngið fyri Guði |
| Sunnudagur 24. | 15.s.e. trinitatis • **Matt 6,24-34** |
| Mánadagur 25. | **Ez 46,4-15** • Sum grónoffur Harranum til handar skal hetta vera ævig skipan |
| Týsdagur 26. | **46,16-24** • Eingin í fólki mínum verður rikin burtur av jarðarogn síni |
| Mikudagur 27. | **47,1-20** • Tey fáa av tí vatninum, sum gongur út frá halgidóminum |
| Hósdagur 28. | **47,21-48,15** • Hetta landið skulu tit skifta sundur tykkara millum |
| Fríggjadagur 29. | **48,16-35** • Og navn borgarinnar skal frá tí degi vera: Harrin er har |
| Leygardagur 30. | **Orðt 13,13-25** • Halt teg at vísum, tá verður tú vísur |

# Tey trý pastoralbrøvini

Tað eru 13 brøv í Nýggja Testamenti, sum Paulusi hevur skrivað og sent. Trý teirra, Fyrra og Seinna Timoteusarbræv og Titusbrævið, eru ein bólkur fyri seg, við tað at tey líkjast hvørt øðrum bæði í málburði, stíli og innihaldi.

Tey trý brøvini siga gjølla frá, hvussu móttakararnir skulu bera seg at og loysa sínar uppgávur sum oddamenn í kirkjuliðunum. Alt frá nýtestamentligari tíð hevur hirðin (latín: pastor) verið nýttur sum ímynd fyri oddamenn í kirkjuliðunum, og harav stavar navnið á teimum trimum brøvunum: Pastoralbrøvini.



Um Timoteus stendur bæði í Paulusar brøvum og í Ápostlasøguni. Hann verður lýstur sum næsti starvsfelagi hjá Paulusi í missiónsarbeiðinum og sendir saman við Paulusi eina røð av hansara brøvum. Paulus hevði Timoteus sum sendiboð til kirkjulið, sum hann sjálvur ikki fekk farið til, og lýsir hann (í Filippibrævinum 2. Kapitli 22. ørindi) sum „eitt barn, sum hjálpir pápa sínum“.

Tá ið Fyrra Timoteusarbræv 1. kapittul ørindi 3 verður samanborið við Seinna Timoteusarbræv 1. kapittul ørindi 6, fær ein ta fatan, at Paulus við handaálegging til eitt hátíðarhald hevur innsett Timoteus sum fyristøðumann í kirkjuliðinum í Efesus, og tað er í hesi tænastu, hann nú í teimum báðum brøvunum fær tileggjan og vegleiðingar um, hvussu hann skal umsita uppgávuna.

Titus er eisini ein av Paulusar týdningarmestu starvsfeløgum. Hann er gaman í ikki nevndur í Ápostlasøguni, men av Paulusar egnu brøvum skilst, at hann hevði ein týdningarmiklan leiklut, m.a. í viðurskiftunum millum Paulus og kirkjuliðið í Korint. Titus varð innsettur sum umsjónarmaður á Kretu (Titusbrævið 1. kapittul 5. ørindi).

Í leiðbeiningunum, sum hesi trý brøvini geva, er stórur dentur lagdur á at standa fast við ta heilnæmu læruna mótvegis øllum møguligum hugsanum. Stórur dentur verður lagdur á, at tey elstu og lærararnir og onnur embætisfólk í kirkjuliðunum skulu liva eitt ólastandi lív sum fyrimynd hjá øðrum. Brøvini geva nágreiniligar leiðbeiningar hjá teimum ymisku bólkunum í kirkjuliðunum: menn, kvinnur, trælir, einkjur og annað mangt, um hvørjar góðar eginleikar tey eiga at stremba eftir at sýna. Í samsvari við tíðarinnar skrivingarlag verða áminningarnar ofta orðaðar sum heilir listar yvir dygdir og lastir, sum strembast skal eftir og skulu verða skýggjaðar.

Maja Lisa Engelhardt
Úr Bibelens største fortællinger
Bibelselskabet Forlag 2014
síða 162

# OKTOBER

| | | |
|---|---|---|
| Sunnudagur 1. | 16.s.e. trinitatis • **Luk 7,11-17** |
| Mánadagur 2. | **2 Sám 1,1-16** • Sául og Jónatan, sonur hansara, fullu |
| Týsdagur 3. | **1,17-27** • Á, at hetjurnar fullu |
| Mikudagur 4. | **2,1-28** • Einans Júda bant felag við Dávid |
| Hósdagur 5. | **2,29-3,13** • Hús Sáuls í sama mun gekk aftur á hond |
| Fríggjadagur 6. | **3,14-27** • Gev mær Mikal, konu mína, aftur |
| Leygardagur 7. | **Sl 69,1-7** • Flóðin yvir meg skolar |
| Sunnudagur 8 | 17.s.e. trinitatis • **Luk 14,1-11** |
| Mánadagur 9. | **2 Sám 3,28-39** • Harrin skal gjalda hvørjum illgerðarmanni |
| Týsdagur 10. | **4,1-12** • Síðan tóku teir høvur Ísjbosjets |
| Mikudagur 11. | **5,1-16** • Tú skalt vera høvdingi yvir Ísrael |
| Hósdagur 12. | **5,17-25** • Hann vann sigur á Filistum |
| Fríggjadagur 13. | **6,1-23** • Fyri ásjón Harrans dansaði eg |
| Leygardagur 14. | **Sl 69,8-19** • Hjálp mær úr díki |
| Sunnudagur 15. | 18.s.e. trinitatis • **Matt 22,34-46** |
| Mánadagur 16. | **2 Sám 7,1-17** • Hásæti títt skal ikki vikast um ævir |
| Týsdagur 17. | **7,18-29** • Tú, Harrin, ert vorðin Guð tess |
| Mikudagur 18. | **8,1-18** • Harrin gav Dávidi sigur á øllum ferðum hansara |
| Hósdagur 19. | **9,1-13** • Enn er á lívi sonur Jónatans |
| Fríggjadagur 20. | **10,1-19** • Latum okkum berjast menniliga |
| Leygardagur 21. | **Sl 69,20-37** • Eg kann prísa Guðs navni við songi |
| Sunnudagur 22. | 19.s.e. trinitatis • **Matt 9,1-8** * (eftir før. tekstarøð) |
| Mánadagur 23. | **2 Sám 11,1-27** • Dávid sendi nú boð eftir henni |
| Týsdagur 24. | **12,1-14** • Tú ert maðurin |
| Mikudagur 25. | **12,15-31** • Tá leitaði Dávid til Guðs fyri sveinin |
| Hósdagur 26. | **13,1-22** • Ikki verður soleiðis farið fram í Ísrael |
| Fríggjadagur 27. | **13,23-39** • Kongur syrgdi Amnon, son sín, alla ta tíðina |
| Leygardagur 28. | **Orðt 14,1-19** • Enntá í látri kennir hjartað trega |
| Sunnudagur 29. | 20.s.e. trinitatis • **Matt 22,1-14** |
| Mánadagur 30. | **2 Sám 14,1-20** • Harri mín er í vitsku javnur við sjálvan ørindasvein Guðs |
| Týsdagur 31. | **14,21-33** • Og kongur mynti Absalon |

# NOVEMBER – DESEMBER

| | |
|---|---|
| Mikudagur 1. | **Tit 1,1-16** • Alt er reint fyri reinar |
| Hósdagur 2. | **2,1-3,2** • Guðs náði er vorðin opinberað til frelsu |
| Fríggjadagur 3. | **3,3-15** • Hetta orðið er satt |
| Leygardagur 4. | **Sl 70,1-6** • Tú ert hjálp mín og frelsari mín |
| Sunnudagur 5. | Allahalgannadagur • **Matt 5,1-12** |
| Mánadagur 6. | **2 Sám 15,1-12** • Fólkið fjølgaðist í hvørjum uttan um Absalon |
| Týsdagur 7. | **15,13-37** • Og alt landið stórgræt, tá herfólkið alt gekk framvið |
| Mikudagur 8. | **16,1-14** • Far burtur, far burtur, tú blóðhundur og bølmenni |
| Hósdagur 9. | **6,15-17,14** • Faðir tín er mikil bardagamaður |
| Fríggjadagur 10. | **17,15-29** • Búgvist nú til og farið sum skjótast yvir um ánna |
| Leygardagur 11. | **Sl 71,1-8** • Til tín er altíð mín vón |
| Sunnudagur 12. | 22.s.e. trinitatis • **Matt 18,23-35** |
| Mánadagur 13. | **2 Sám 18,1-17** • Farið mær varliga við sveininum Absaloni |
| Týsdagur 14. | **18,18-32** • Tíðindaløn fært tú kortini onga |
| Mikudagur 15. | **19,1-9** • Absalon, sonur mín, sonur mín! |
| Hósdagur 16. | **19,10-24** • Í dag eri eg aftur vorðin kongur í Ísrael |
| Fríggjadagur 17. | **19,25-44** • Síðan fór alt liðið yvir um Jórdan |
| Leygardagur 18. | **Sl 71,9-16** • Harri, eina um rættvísi tína vil eg boða *(sjálvur valt) |
| Sunnudagur 19. | 23.s.e. trinitatis • **Matt 22,15-22** |
| Mánadagur 20. | **2 Sám 20,1-12** • Vit eiga ongan lut í Dávidi |
| Týsdagur 21. | **20,13-22** • Høvur hans skal verða varpað tær út um borgargarðin |
| Mikudagur 22. | **20,23-21,9** • Á Sáuli og ætt hansara hvílir blóðsøk |
| Hósdagur 23. | **21,10-22** • So at tú ikki sløkkir lampu Ísraels |
| Fríggjadagur 24. | **22,1-25** • Í himni læt Harrin toruna ganga |
| Leygardagur 25. | **Orðt 14,20-35** • Tann, sum armingan kúgar, vanvirðir skapara hans |
| Sunnudagur 26. | Síðsti sunnudagur í kirkjuárinum • **Matt 9,18-26** |
| Mánadagur 27. | **2 Sám 22,26-51** • Hann miskunnar hinum salvaða tínum *(øðrvísi, ø. 51) |
| Týsdagur 28. | **23,1-12** • Andi Harrans talaði í mær |
| Mikudagur 29. | **23,13-39** • Hann var í miklum mæti |
| Hósdagur 30. | **24,1-17** • Tað eri eg, sum havi syndað |
| Fríggjadagur 1. | **24,18-25** • Far niðan og reis altar |
| Leygardagur 2. | **Sl 71,17-24** • Úr jarðarinnar dýpum okkum aftur |



# HJÁLP KRISTNUM, SUM VERÐA ATSØKT

Kristin verða alsamt meir og meir atsøkt. Nunnan Sara mátti flýggja úr Mosul í Irak, tá ið Islamiskur Statur søkti at býnum. Stríðshugaðir islamistar noyða tey kristnu at rýma úr teimum gomlu bíbilsku heimlondunum.

Í stórum pørtum av Afrika og Miðeystri verða tey kristnu eyðmýkt, atsøkt, fongslað og dripin fyri teirra trúgv. Nógv bíbliufeløg eru hótt, og mangir bíbliuumsetarar mugu fjala seg.

Stuðla kristnum, sum verða atsøkt, við mati, innivist, upptøkum um kristindóm og trúgv, sálarrøkt, forsprákara-visksemi og bíblium.

## TÍN FASTI STUÐUL BROYTIR LÍV

Stuðlar tú Bíbliufelagnum fast, bjargar tú mannalívum og gevur kristnum møguleika at inna teirra átrúna.

## SO EINFALT KANST TÚ STUÐLA **BÍBLIUR TIL FLÓTTAFÓLK**

**1 bíblia = 35 kr**
**10 bíbliur = 350 kr**
**100 bíbliur = 3500 kr**

**TYGUM KUNNU FLYTA PENING Á HESAR KONTUR**

- **BankNordik konta nr. 6460 3828737**
- **Eik Banki konta nr. 9181 3807772**
- **Norðoya Sparikassi konta nr. 9865 9926466**
- **Suðuroyar Sparikassi konta nr. 9870 9929920618**

**Merkið flytingina „Bíbliur til flóttafólk“**

**Vælkomin at senda spurningar á biblia@biblia.fo**

**TÚSUND TAKK FYRI HJÁLP TÍNA**

*Sara er ikki rætta navn hennara.*

# Føroyska Bíbliufelagið

Fyri at gerast limur í Føroyska Bíbliufelagnum er neyðugt at árliga limagjaldið á 200,- kr. er goldið frammanundan.

Føst flyting tryggjar, at limaskapurin verður varðveittur. Henda áheitan til peningastovn kann nýtast at stovna eina fasta flyting til Bíbliufelagið.

Til ber eisini sjálv/ur at stovna fasta flyting um netbanka
og at maila navn og fartelefon til biblia@biblia.fo

Navn: ______________________________

T-postur: ______________________________

Fartel.: ______________________________

Heitt verður á: (set x við tín peningastovn) um at stovna fasta árliga flyting til:

☐ BankNordik konta nr. 6460 382 873 7

☐ Eik Banka konta nr. 9181 380 777 2

☐ Norðoya Sparikassa konta nr. 9865 992 646 6

☐ Suðuroyar Sparikassa konta nr. 9870 992 061 8

av kontu míni: ______________________________

Dagur og undirskrift ______________________________

Giljavegur 32 · FO-360 Sandavágur
T-postur: biblia@biblia.fo · www.biblia.fo

# STÝRISLIMIRNIR Í FØROYSKA BÍBLIUFELAGNUM

**Jógvan Fríðriksson**, forseti í stýrinum, biskupur, fólkakirkjan
**Bergur D. Joensen**, formaður í stýrinum, sóknarprestur, fólkakirkjan
**Dánial á Dul Jacobsen**, næstformaður í stýrinum, hvítusunnusamkomurnar
**Uni Næs**, stýrislimur, dómpróstur, fólkakirkjan
**Pauli Høj**, stýrislimur, pastorur í Kelduni, karismatisku kirkjurnar
**Ole Jakob Nielsen**, stýrislimur, listamaður, Katólska kirkjan
**Jenny Lydersen**, stýrislimur, undirvísingarleiðari á Mentamálaráðnum, fólkakirkjan
**Øssur Kjølbro**, stýrislimur, aðalskrivari, Kirkjuliga Heimamissiónin
**Atli Rasmussen**, stýrislimur, Kirkjuliga Missiónsfelagið, HR-leiðari á Lív
**Tummas Lauritsen**, stýrislimur (valdur á aðalfundi 2015), faklærari í Tekniska skúla
**Annelisa Rasmussen**, stýrislimur (vald á áðalfundi 2015), lærari
**Gunnar K. Nattestad**, aðalskrivari hjá Bíbliufelagnum

# ENDAMÁL

**Endamálið hjá Føroyska Bíbliufelagnum er:**

1. at geva út Bíbliuna og partar av henni á føroyskum máli og at fáa Bíbliuna út
2. at skipa fyri at týða Bíbliuna ella partar av henni, at endurskoða verandi bíbliuútgávur, at geva út bíbilsku skriftirnar í øðrum útgávum enn teimum løggildu og annað viðkomandi tilfar
3. at fremja bíbliunýtslu, bíbliulesnað og bíbliukunnleika
4. at hava innsavningar og forlagsvirksemi
5. at umsita sambandið við útlendsk bíbliufeløg
6. at stuðla altjóða bíbliuarbeiði

# STYTTINGAR

| | |
|---|---|
| Ám | Ámos |
| Áps | Ápostlasøgan |
| Dán | Dánjal |
| Dóm | Dómarabókin |
| Ef | Efesusbrævið |
| Est | Esterarbók |
| Ez | Ezekiel |
| Ezra | Ezra |
| Fil | Filippibrævið |
| Filem | Filemonsbrævið |
| Gal | Galatarbrævið |
| Hab | Habakkuk. |
| Hagg | Haggai |
| Harm | Harmljóðini |
| Hás | Hásongurin |
| Hebr | Hebrearabrævið |
| Hos | Hosea |
| Ják | Jákupsbrævið |
| Jer | Jeremia |
| Jes | Jesaja |
| Job | Jobsbók |
| Jóel | Jóel |
| Jóh | Evangeliið eftir Jóhannes |
| Jón | Jónas |
| 1 Jóh | Fyrsta bræv Jóhannesar |
| 2 Jóh | Annað bræv Jóhannesar |
| 3 Jóh | Triðja bræv Jóhannesar |
| Jós | Jósva |
| Jud | Judasarbrævið |
| Kol | Kolossubrævið |
| 1 Kong. | Fyrra Kongabók |
| 2 Kong | Seinna Kongabók |
| 1 Kor | Fyrra Korintbrævið |
| 2 Kor | Seinna Korintbrævið |
| 1 Krýn | Fyrra Krýnikubók |
| 2 Krýn | Seinna Krýnikubók |
| Luk | Evangeliið eftir Lukas |
| Mal | Malaki |
| Mark | Evangeliið eftir Markus |
| Matt | Evangeliið eftir Matteus |
| Mika | Mika |
| 1 Mós | Fyrsta Mósebók |
| 2 Mós | Onnur Mósebók |
| 3 Mós | Triðja Mósebók |
| 4 Mós | Fjórða Mósebók |
| 5 Mós | Fimta Mósebók |
| Nah | Nahum |
| Óbad | Óbadia |
| Opb | Opinberingin |
| Orðt | Orðatøk Sálomons |
| 1 Pæt | Fyrra Pætursbræv |
| 2 Pæt | Seinna Pætursbræv |
| Præd | Prædikarin |
| Róm | Rómverjabrævið |
| Rut | Rutarbók |
| 1 Sám | Fyrra Sámuelsbók |
| 2 Sám | Seinna Sámuelsbók. |
| Sef | Sefanja |
| Sl | Sálmarnir |
| 1 Tess | Fyrra Tessalónikubræv |
| 2 Tess | Seinna Tessalónikubræv |
| 1 Tim | Fyrra Timoteusarbræv |
| 2 Tim | Seinna Timoteusarbræv |
| Titus | Titusarbræv |
| Zak | Zakarja |

# ESKJA TIL BÍBLIUVERS




Eitt bíbliuvers gevur høvi til umhugsan og kann eggja til bíbliulesna. Bíbliufelagið hevur latið gjørt eskjur til bíbliuvers. Eskjan hevur ein vakran reyðan lit og kann standa ella hanga í forkirkjuni og í missións- og samkomuhúsum o.a. Á eskjuni er teksturin: „Fá tær eitt bíbliuvers.“
Í hvørjum bunti av bíbliuversum eru umleið 250 kort við ymiskum bíbliuversum.
Eskja og bíbliuvers fáast til keyps frá Bíbliufelagnum.

# BÍBLIU-APP FRÁ BÍBLIUFELAGNUM




Bíbliu-Appin er til iPhone, iPad, iPod touch og Android. Les meira á www.biblia.fo

Bíbliufelagið hevur latið gjørt Bíbliu-App til Dahl/Viderø Bíbliuna. Við appini kanst tú lesa alla Bíbliuna á fartelefonini/teldlinum, leita í Bíbliuni, fáa mannakorn til hvønn dag, deila á facebook og mangt annað.

**Vitja heimasíðuna hjá Bíbliufelagnum**
**Á heimasíðuni ber til at lesa og**
**hoyra upplestur (teldutala) av Bíbliuni og greinum.**

**Les meira á: www.biblia.fo**
**Føroyska Bíbliufelagið**
**Giljavegur 32**
**FO-360 Sandavágur**
**T-postur: biblia@biblia.fo**